VINNUNÁM

# Nýggj tænasta

**Vinnuhúsið økir nú um tænastustøðið til limir sínar og fer at bjóða skeið og tiltøk undir heitinum Vinnunám.**

Endamálið er at vera við til at økja um fakliga førleikan hjá fyritøkum – bæði á leiðslustøði, men eisini innan ítøkiligar partar av gerandisdegnum í eini fyritøku.

Málið hjá Vinnunám er at bjóða limunum dygdarskeið og kunningardagar, sum eru beinrakin og viðkomandi fyri vinnuna.

Vinnunám fer javnan at bjóða fram vinnuskeið og kunningardagar, men fer eisini seinni at samanseta netverk av ymsum slag.

Vinnunám er fyri limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðsgevarafeløgum undir hesum.

## Starvsfólkasetan

**setanarætlan, samrøða og avgerð**

Hvussu kanst tú innanfyri ein hálvan til ein tíma skapa tær eina álítandi fatan av einum øðrum persóni, soleiðis at fatanin kann vera grundarlagið fyri, um tú fert undir eitt fruktagott samstarv, sum væntandi fer at vara í mong ár?

**Skeið**

Dagf.: **23. - 25. November 2006**
Stað: **Hotel Vágar**
Pláss: **12 luttakarar**
Hvør: **Nikolaj Lunøe og Jan Willemoes**
Kostn.: **8.000,-**
Freist: 3. november

Les meira á industry.fo

## Coaching

**eitt amboð til betri at leiða tíni starvsfólk**

Hvussu kanst tú eggja og leiða starvsfólk, soleiðis at starvsfólkið kennir sambandi við leiðaran sum gevandi og eggjandi, til tess at starvsfólkið troytur orku sína best møguligt í dagliga arbeiðnum.

**Skeið**

Dagf.: **13. - 15. November 2006**
Stað: **Hotel Vágar**
Pláss: **12 luttakarar**
Hvør: **Nikolaj Lunøe og Jan Willemoes**
Kostn.: **8.000,-**
Freist: 3. november

Les meira á industry.fo

## Skjalamannagongdir

**Innflutningur**

Fá innlit í, hvussu røttu mannagongdirnar eru í sambandi við innflutning til Føroya, og hvørjar lógir og reglur liggja aftanfyri hesar mannagongdir. Kunningardagurin verður fyriskipaður í samstarvi við Toll- og Skattstovu Føroya

**Kunningardagur**

Dagf.: **8. November 2006**
Stað: **Fíggjarmálaráðið**
Pláss: **15 luttakarar**
Hvør: **Annsy Høghamar, Kjartan D. Joensen, Hanna Jacobsen**
Kostn.: **500,-**
Freist: 3. november

Les meira á industry.fo

## Skjalamannagongdir

**Útflutningur**

Fá innlit í, hvussu røttu mannagongdirnar eru í sambandi við útflutning úr Føroyum, og hvørjar lógir og reglur liggja aftanfyri hesar mannagongdir. Kunningardagurin verður fyriskipaður í samstarvi við Toll- og Skattstovu Føroya.

**Kunningardagur**

Dagf.: **6. November 2006**
Stað: **Fíggjarmálaráðið**
Pláss: **15 luttakarar**
Hvør: **Annsy Høghamar, Kjartan D. Joensen, Hanna Jacobsen**
Kostn.: **500,-**
Freist: 3. november

Les meira á industry.fo

sansir.fo



Vinnunám
Smærugøta 9A
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

VINNUNÁM
SKEIÐ OG TILTØK VINNUHÚSINS

Tel +298 30 99 00
Fax +298 30 99 01
vinnunam@industry.fo
www.industry.fo

Klaksvíkar Kommuna / Sosiala Deild



# Sosialráðgevi

**Sosialráðgevi til barnaverndartænastuna í Norðoyggjum**

Í samband við at ein av okkara sosialráðgevum er í farloyvi til 1. mars 2007, er eitt avloysarastarv á Sosialu Deild í Klaksvík leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Møguleiki er fyri leingjan av starvinum.

**Starvið:**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran og starvsfólk á deildini, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum sum Barnaverndarumsitingin tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.:**
- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverdarnevndini í barnaverndarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakliga
- at arbeiða fyribyrgjandi í samstarvi við fakpersónar og stovnar á barna- og ungdómsøkinum

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið:**
- er útbúgvin sosialráðgevi
- hevur royndir sum málsviðgeri ella aðrar viðkomandi royndir
- hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógvar bóltar í luftini
- megnar at seta seg inn í støðuna hjá familjum, og hjálpa teimum út frá hesum
- hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg

**Vit bjóða tær:**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum
- Góðar samstarvsfelagar
- Supervisión

**Setanarviðurskifti:**
Starvið, sum er fulltíðarstarv, verður sett skjótast gjørligt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið

**Fleiri upplýsingar:**
Fáast við at venda sær til Jancy Biskopstø Klein, sosialdeildarleiðara á telefon 410000.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi **3. nov. 2006**

**Klaksvíkar Kommuna**
**Postboks 2**
**700 Klaksvík**

creð 458006

**Um barnaverndartænastuna í Norðyggjum:**
Barnaverndartænastan í Norðoyggjum fevnir um Svínoyar, Fugloyar, Kunoyar og Klaksvíkar kommunu. Umsitingarliga er barnaverndartænastan ein eind undir Sosialu deild í Klaksvíkar kommunu.
Uppgávan hjá barnaverndartænastuni er at tryggja børnum, ið liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan.

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I www.klaksvik.fo

NAVMAN **GPS Plottarar, ekkólodd o.a. til stuttleika- & útrórarbátin.**



**Prísir o.a. eru at finna á www.vikmar.fo**

Vikmar

**Tel. 35 21 82**
**Email info@vikmar.fo**